**Skjal 2:**

# Frágreiðing um virki ráðsins 2019

Við hesum lata føroysku ráðslimirnir í Útnorðurráðnum Løgtinginum árligu frágreiðingina um virki sítt í farna ári:

Útnorðurráðið er samstarvsfelagsskapur millum Løgtingið, Landstingið og Althingi. Stevna ráðsins er:

a. At samstarva um áhugamálini hjá londunum í útnorðri
b. Saman at varða av tilfeingi og mentan í londunum í útnorðri, hjálpa til at menna áhugamál í útnorðri um stjórnir og landsstýri, ikki minst, tá ið álvarsom mál stinga seg upp um, hvussu tilfeingið skal skipast, dálking o.a.
c. Fremja samstarv hjá stjórnum og landsstýrum í útnorðri.
d. At arbeiða saman við Norðurlandaráðnum og vera millumliður í áhugamálum hjá londunum í útnorðri í norðurlendskum samstarvi.

Fyri virksemið hjá Útnorðurráðnum er galdandi "Sáttmálaskjal um Útnorðurráðið", samtykt á Løgtingi 26. mai 1997. Ráðið virkar sambært serligari starvsskipan. Útnorðurráðið hevur skrivstovu í Reykjavík og sína egnu heimasíðu www.vestnordisk.is

Løgtingið velur 6 limir í ráðið, Althingi 6 og Inatsisartut 6.

Frá 15. desember 2015 hevur Útnorðurráðið verið mannað við hesum limum:

Kári P. Højgaard, formaður
Jørgen Niclasen, næstformaður
Annika Olsen
Bjørt Samuelsen
Bill Justinussen
Magni Laksáfoss

Síðan januar 2017, tá Annika Olsen fór í farloyvi úr tinginum, hevur Joen Magnus Rasmussen havt sæti í nevndini.

**Løgtingsval 31. august 2019**
Á tingfundi 17. september 2019 valdi Løgtingið hesar limir í føroysku sendinevndina til Útnorðurráðið:

Edva Jacobsen
Heðin Zachariasen
Steffan Klein Poulsen
Henrik Old
Høgni Hoydal
Poul Michelsen

Nevndin skipaði seg á fundi 17. september 2019 við Henrik Old sum formanni og Edvu Jacobsen sum næstformanni og limi í arktiska arbeiðsbólkinum í Útnorðurráðnum.
Avtala varð gjørd um, at formaðurin og næstformaðurin býta um sess um tvey ár, soleiðis at Edva Jacobsen yvirtekur formanssessin og Henrik Old tá verður næstformaður.
Tvey tey fyrstu árini er Edva Jacobsen limur í arktiska arbeiðsbólkinum og Høgni Hoydal er varalimur. Tá tvey ár eru liðin yvirtekur Høgni Hoydal sessin sum limur í arktiska arbeiðsbólkinum í Útnorðurráðnum og Steffan Klein Poulsen verður varalimur.

Síðan 23. september 2019, tá Poul Michelsen fór í farloyvi úr tinginum, hevur Ruth Vang havt sæti í nevndini.

**Formansskapurin**
Á ársfundi í Tórshavn 4. – 5. september 2018, varð nýggjur formanskapur valdur:

Formaður: Hans Enoksen
1. næstformaður: Guðjón S. Brjánsson
2. næstformaður: Kári P. Højgaard

Tann 5. oktober varð nýggj sendinevnd mannað í Grønlandi, við Vivian Motzfeldt sum formanni.

Formanskapurin frá 5. oktober 2018 varð mannaður soleiðis:

Formaður: Vivian Motzfeldt
1. næstformaður: Guðjón S. Brjánsson
2. næstformaður: Kári P. Højgaard

Á ársfundi í Nuuk 22. og 23. oktober 2019, varð nýggjur formansskapur valdur:

Formaður: Guðjón S. Brjánsson
1. næstformaður: Henrik Old
2. næstformaður: Vivian Motzfeldt

Formansskapurin hevur tilsamans hildið 6 fundir í 2019:

- 28. januar  Reykjavík
- 5. apríl telefonfundur
- 20. august Nuuk
- 7. oktober Reykjavík
- 21. oktober Nuuk
- 29. oktober Stokholm

**Evnisfundur 30. januar 2019 í Reykjavík**
Evnið á fundinum var: “De vestnordiske landes stilling i den nye geopolitiske virkelighed”.

Fyrilestrarhaldarar vóru úr Íslandi, Føroyum og Grønlandi. Tilsamans vóru uml. 60 luttakarar á evnisfundinum.

**Ársfundur 2019**

Á ársfundinum vórðu 2 tilráðingar samtyktar og 5 innanhýsis avgerðir, m.a. áseting av limagjaldi fyri 2021.